tungt, og ætlanirnar um at søkja inn á løgregluskúla kunnu ikki fullfíggjast fyrr enn hondin er vorðin frísk.

## Skjóta aftur

Sjálvt um báðir drongirnir fingu ein rættiligan skelk fyri einum ári síðani, so ætla teir eisini at skjóta fýrverk í ár. Tó eru teir báðir samdir um, at tað verður við størri fyrivarni enn seinast.

– Fyri meg kann tað gera tað sama, hvør skjýtur. Eg kann væl skjóta sjálvur, men eg leggi heldur onki í, um eg bara skal hyggja at. Eg vil bara sleppa at síggja fýrverkið, sigur Tummas.

Kristian, sum er púra samdur, leggur afturat:

– Eg elskaði at sleppa at skjóta fyrr. Men hesuferð verður tað so við meira skili. Tað nyttar í øllum førum ikki nakað at renna undan nýggjárinum.



*Í dag eru bæði Tummas og Kristian væl lektir. Tummasi vantar tó enn eina skurðviðgerð í hondini*





petur & petur • 320870

# STJÓRI

## Hevur tú hug at leiða Timburhandilin inn í framtíðina?

**Sum stjóri** fært tú latið upp í hendur saman við verandi stjóra at menna og leiða fyritøkuna. Tú fært ábyrgd og leiðsluna av dagliga rakstrinum hjá Timburhandlinum, og við málsøkni og planlegging skal tú tryggja, at fyritøkan við nøktandi úrsliti røkkur málum, sum tú verður við til at seta.

**Uppgávur tínar** fevna um leiðslu, planlegging og menning av øllum rakstrarøkjum, ið hava beinleiðis samband við vanliga raksturin hjá Timburhandlinum. Tú skalt umboða fyritøkuna úteftir, samstundis sum tú skal virka fyri, at drívmegi er í fyritøkuni at røkka tínum málum.

**Vit vænta** at tú ert álítandi fólk, sum hevur evni at leiða eitt virkið arbeiðspláss, at tú hevur áræði og skapanarevni, ið mugu til fyri at reka eina fyritøku í eini vinnugrein, ið er merkt av sera harðari kapping.
Vit vænta, at tú hevur evni at brynja fyritøkuna til tær avbjóðingar, ið liggja fyri framman. Tað skal fella tær náttúrligt at arbeiða sjálvstøðugt og at skipa arbeiðsviðurskifti hjá øðrum

**Tínar kvalifikatiónir** skulu byggja á hægri útbúgving innan øki, ið mugu metast at stuðla tær í starvi sum leiðandi starvsfólk. Royndir innan vinnulív ella leiðslu i profittskapandi felag ella felagsskapi e.l. eru viðkomandi og avgerandi.

**Frá okkum** fært tú boðið eitt spennandi og vællønt starv, har tú innan tryggar karmar veruliga fær møguleika at royna tíni evni. Í samstarv við verandi stjóra og nevnd felagsins verður tað tú, ið skalt fyriskipa flestu viðurskifti í fyritøkuni.

**Freistin** at søkja starvið er **20 januar. 2005**. Miðað verður eftir at seta starvið í seinasta lagi tann 1. apríl 2005.

Umsókn saman við viðkomandi skjølum skal sendast til:
**Timburhandilin**
**Heykavegur 4**
**Box 3038**
**100 Tórshavn**
**Att: Heini Fosaa, stjóra**

Timburhandilin varð stovnaður í 1928. Fyritøkan er í dag ein framkomin fyritøka av sínum slag sum rekur handlarnar Timburhandilin á Hálsi í Havn, 2x3 og Timburhandilin á Kambsdali, sum samanlagt hava eitt søluøki á slakar 8000 m2 innandura. Fyritøkan er saman við P/F Vest Pack partur av H.T. Holding-samtakinum, sum hevur ein árligan umsetning uppá góðar 110 mió kr. Samanlagt starvast 75 fólk í samtakinum.

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

**Heykavegur 4 • Postsmoga 3038 • 110 Tórshavn** • Tel 31 12 50 • Fax 31 54 60 • ht@ht-tilfar.fo
**www.timburhandilin.fo**